# VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og norði og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Hvassur vindur ella skrið av norði og útnyrðingi og ælingur, partvís vátakavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útnyrðingi og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi ella av ymsum ættum og leygardagin okkurt kavaælið, men sunnudagin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 5 stig.

# Væleydnað musikkstevna og konsert

**Um vikuskiftið var musikkstevna í Trongisvági, har musikkskúla-næmingar og lærarar úr øllum landinum hittust. Endað varð við frálíkari konsert sunnudagin**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Vikuskiftið var merkt av tónleiki og hugnaligari samveru hjá mongum musikkskúlanæmingum, og foreldrum og lærarum teirra. Tey komu úr øllum landinum til Suðuroyar at venja, spæla og vera saman um vikuskiftið.

Otniel Nygaard, leiðari fyri Musikkskúlan í Suðuroynni, fegnaðist sunnudagin á endakonsertini um, at alt hevði gingið sum eftir ánni, hóast eini 200 fólk høvdu verið saman alt vikuskiftið, men hann takkaði samstundis foreldrabólkinum í Suðuroynni, sum hevði verið til hjálpar og gjørt tiltakið møguligt. Hann fegnaðist um, at ung úr øllum landinum á henda hátt kundu hittast við tónleikinum sum orsøk.

Konsertin sunnudagin í høllini í Trongisvági prógvaði, at væl var komið burturúr, og umframt sá út til, at øll hugnaðu sær og høvdu havt eitt gott vikuskifti.



*Konsertin sunnudagin í høllini í Trongisvági prógvaði, at væl var komið burturúr um vikuskiftið*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -1 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 18 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | -- |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 13 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 11 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 9 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 20 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | -- |
| New Dehli | -- |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 30 |
| New York | 25 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 990 hPa. við Hetland fer spakuliga eystureftir og dýpist.



**Í dag:**
Lágtrýstið við Suður-Noreg fer í landsynning og gevur nógvan vind av norði á okkara leiðum

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/08 kl. $06^{00}$ – 10/09 $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,4°
Minsti hiti máldur í september: 0,4° - Mesti hiti máldur í september: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 09/08 kl. $06^{00}$ – 10/09 $06^{00}$.
Avfallið higartil í september: 43 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

Alt um harmonikur



www.simme.eu

## VESTFALLSKYRRINDI

20. september Mánin næstur jørðini
29. september Tendring
5. oktober Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29. sept | 7:09 | 19:30 | 6:09 | 18:30 | 6:24 | 18:45 | 9:09 | 21:30 | 10:09 | 22:30 | 5:24 | 17:45 | 4:24 | 16:45 | 7:24 | 19:45 | 8:24 | 20:45 | 6:54 | 19:15 | 8:09 | 20:30 |
| 30. sept | 7:52 | 20:15 | 6:52 | 19:15 | 7:07 | 19:30 | 9:52 | 22:15 | 10:52 | 23:15 | 6:07 | 18:30 | 5:07 | 17:30 | 8:07 | 20:30 | 9:07 | 21:30 | 7:37 | 20:00 | 8:52 | 21:15 |
| 1. okt | 8:37 | 21:00 | 7:37 | 20:00 | 7:52 | 20:15 | 10:37 | 23:00 | 11:37 | - | 6:52 | 19:15 | 5:52 | 18:15 | 8:52 | 21:15 | 9:52 | 22:15 | 8:22 | 20:45 | 9:37 | 22:00 |
| 2. okt | 9:22 | 21:45 | 8:22 | 20:45 | 8:37 | 21:00 | 11:22 | 23:45 | 0:00 | 12:22 | 7:37 | 20:00 | 6:37 | 19:00 | 9:37 | 22:00 | 10:37 | 23:00 | 9:07 | 21:30 | 10:22 | 22:45 |
| 3. okt | 10:08 | 22:31 | 9:08 | 21:31 | 9:23 | 21:46 | - | 12:08 | 0:45 | 13:08 | 8:23 | 20:46 | 7:23 | 19:46 | 10:23 | 22:46 | 11:23 | 23:46 | 9:53 | 22:16 | 11:08 | 23:31 |

Lesið Sosialin